# handVERKARIN

BLAÐ NR. 52

HAVNAR HANDVERKARAFELAG





# NÚ STUNDAR TIL JÓLA

Handverkarin tú nú situr við er tann seinasti í hesum árinum.

Hettar minnir okkum á, at 2014 er farið at halla. Árið 2014 hevur verðið hendingaríkt. Lønarsamráðingar við FHMF/FAG vóru í oktober. Meiningarnar eru ymiskar um, hvat kom burturúr. Eitt kunna vit tó verða samd um, tað eydnaðist okkum hesaferð at flyta sáttmálatíðarskeiðið soleiðis, at hesin sáttmálin gongur út 1 mai, í staðin fyri 1. oktober. Tað hevur verið eitt krav frá okkum til hvørja lønarsamráðing síðani 2003.

Munurin var hesaferð, at vit settu tað sum eitt ófrávíkiligt krav, og tað var helst orsøkin til, at semingsstovnurin kom uppí. At hetta var ein røtt avgerð, vísir úrslitið, sum semja bleiv um.

Okkara sáttmáli gongur út 1. mai 2016, treyta av, at vit innan 1. januar 2016 finna semju við hini fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum, um eina felags samráðingarnevnd, sum skal samráðast um sjálvan lønarkarmin. Alt annað skula feløgini sjálvi samráðast um. Eitt annað, sum hendir í hesum árinum er, at felagshús okkara verður umbygt og nútímansgjørt. Umbygging verður vantandi liðug til jóla.

At enda fara vit at takka fyri gott samstarv, og ynskja limum okkara við familju eini gleðilig jól og eitt av harranum signað nýggjár. Gjørt verður vart við, at skrivstovan er stongd frá 19. desember 2014. Vit hava opið aftur sum vanligt 5. januar 2015.

*Eli Brimsvík, formaður.*





**Í blaðnum hesa ferð:** **síða**


Oddagrein . . . . . s. 2
Útbúgvingarmøguleikar í tekniska skúla í tórshavn . . . . . s. 3
Sjónarhornið: Fróði Benjaminsen. . . . . s.14
80 ára hátíðarhald í Tekniska skúla í Tórshavn . . . . . s. 18
LØNARTALVA – 1. oktober 2014 Nr. 66. . . . . s. 23
Marknagilsdepilin, tann góða ætlanin við nógvum trupulleikum . . . . . s. 28



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo

# ÚTBÚGVINGARMØGULEIKAR Í TEKNISKA SKÚLA Í TÓRSHAVN



Tá talan er um handverksútbúgvingar eru 6 høvuðsbólkar:

- ✓ Timbur
- ✓ Snikkara
- ✓ EL
- ✓ Bilsmíð
- ✓ Metal
- ✓ Hárfríðkan

## Útbúgving við lærusáttmála

Hjá teimum, sum hava gjørt sáttmála við eitt lærupláss, verður skúlagongdin løgd til rættis saman við læruplássinum soleiðis, at lærlingurin er í verkligu læruni ímillum tey ymisku skúlaskeiðini.

Hesar útbúgvingar taka vanliga 4 ár; av hesum eru skúlaskeiðini tilsamans 55 vikur.

Ímillum hesi skúlaskeiðini er lærlingurin í verkligari læru hjá læruplássinum.

Við lærusáttmála eru fýra skúlaskeið: Skúlaskeið 1, 2, og 3. Eftir hetta er eitt skúlaskeið, sum fevnir yvir 5 vikur; tá skal lærlingurin til sveinaroynd.

### Skúlaskeið 1 og 2

Hesi skúlaskeið eru 20 vikur hvørt. Tá hevur lærlingurin yrkislærugreinar og almennar lærugreinar á E stigi.

### Skúlaskeið 3

Í 3. skúlaskeiði, sum fevnir um 10 vikur, hevur lærlingurin bert yrkislærugreinir at hugsa um, og sleppur at førleikamenna seg í sínum yrki burturav og miðvíst. Tað eru bert lærlingar við lærusáttmála, sum kunnu fara undir skúlaskeið 3; og tá skal lærlingurin hava arbeitt á læruplássinum ávísa tíð.

### Sveinaroyndin

Tá ið Skúlaskeið 3 er lokið kann lærlingurin fara til sveinaroynd og fáa sveinabræv í sínum yrki; sveinaroyndin fevnir um 5 vikur.

## Tekniskt Yrkisnám (uttan lærusáttmála)

Tey, sum ikki hava lærusáttmála kunnu søkja um upptøku á Tekniskum Yrkisnámi.

Tá verður byrjað við skúlaskeiði 1 og 2 (sum greitt er frá omanfyri). Hesi verða tikin saman við lærlingum, sum hava lærusáttmála.

Tekniskt Yrkisnám kann takast eftir einum ella tveimum árum.

Næmingar, sum hava tikið skúlaskeið 1 og 2, kunnu halda fram á skúlaskeiði 4.

Á skúlaskeiði 4 verður arbeitt við yrkisverkætlanum. Harumframt er undirvísing í almennum lærugreinum á C stigi; og møguligt er at taka støddfrøði á B stigi.

Tey sum hava handverkaraútbúgving – við lærusáttmála – kunnu fara beinleiðis undir skúlaskeið 4.

### Styttri framhaldsútbúgvingar

Eftir skúlaskeið 4 er møguligt at fara undir styttri framhaldsútbúgving sum t.d. Byggi- ella Framleiðslutøkning.

## ✓ Timburmaður

Ein timburmaður fæst í høvuðsheitum við at smíða hús. Talan kann vera um sethús, aðrar bygningar og onnur byggiarbeiði. Arbeiðsuppgávan hjá einum timburmanni kann fevna um at forskalla, leggja gólv, smíða útveggir og takverk. Eisini arbeiðir ein timburmaður við at bjálva, klæða, seta vindeygu og hurðar í, at seta køkar upp, umframt aðrar bygningspartar.

Í lærutíðini verður skift ímillum verkliga



læru á góðkendum læruplássi umframt skúlagongd á yrkisskúla. At enda verður sveinaroynd gjørd.

Tá ið tú ert liðug/ur við útbúgvingina kanst tú arbeiða sum timburmaður ella fara undir framhaldslesnað, eitt nú til byggiteknikara/byggifrøðing ella arkitekt.

## ✓ Snikkari

Arbeiðið hjá einum snikkara í dag fevnir t.d. um at gera hurðar, vindeygu og innbúgv. Í hesum sambandi verður arbeitt við ymiskum slagi av tilfari.

Á skúlanum læra næmingarnir at arbeiða við maskinum og ymiskum amboðum.

Hjá einum snikkara hevur tað eisini týdning at duga at vegleiða kundar, talan er um at

duga at leggja fram, grundgeva, tekna og gera tað, sum kundin ynskir.

Tað er møguligt at enda útbúgvingina við ymiskum sergreinum í mun til persónlig áhugamál og læarupláss.

Lærlingurin verður førur fyri at gera og framleiða hurðar, vindeygu, innbúgv, arbeiði sum bygningsmontørur – ella hava sergrein sum bygningssnikkari, møbilsnikkari ella orgulbyggjari.

Ein útlærdur snikkari kann fara undir víðari útbúgving sum t.d. byggitøkningur, designtøkningur, orkutøkningur, kort- og landmátaratøkningur, framleiðslutøkningur, byggifrøðingur og professiónsbachelorur í útflutningi og tøkni.

## ✓ Elektrikari

Ein elektrikari arbeiðir fyrst og fremst við at leggja sterk- og veikstreym inn í sethús, skrivstovur, virkir, skúlar og umborð á skipum. Hetta arbeiði fevnir m.a. um ljós, motorar, elektroniskar stýringar til flutningsskipanir og framleiðslueindir.

Hartil koma tele-, teldu- og antennuinnleggingar, og at ráðgeva kundum í at velja elektriskar loysnir.

Í lærutíðini verður skift ímillum verkliga læru á góðkendum læruplássi umframt skúlagongd á yrkisskúla. At enda verður sveinaroynd gjørd.

Elektrikarar kunnu seinni fara undir framhaldsútbúgvingar sum t.d. KT- og elektronikktøkningur, framleiðslutøkningur, sterkstreymstøkningur, byggi tøkningur ella verkfrøðingur, har neyðugt er við ávísum ískoytislærugreinum.

## ✓ Bilsmiður

Bilsmiðulærlingar læra fyrst og fremst um tey grundleggjandi viðurskiftini sum eru: skrokkur, stýrigreiðir, bremsur, girskipan, bensin- og dieselmotorar og um motorstýringar.

Læran fevnir eisini um tey elektronisku





hjálpartólini, og í hesum sambandi at kanna bremsur, útlát, hjólsporing, elektriskar skipanir, stýringar v.m.

Harumframt koma teir mekanisku og elektronisku partarnir á persónbilum, vørubilum og lutvíst lastbilum.

Í lærutíðini verður skift ímillum verkliga læru á góðkendum læruplássi umframt skúlagongd á yrkisskúla.

At enda verður sveinaroynd gjørd.

## Útbúgvingar í sambandi við metal og metalsmíð

Útbúgvingarnar í metalsmíði eru fleiri og taka tær flestu vanliga umleið 4 ár.

Niðanfyri verður greitt frá hesum útbúgvingum: maskinsmiður, kleinsmiður, rustfastur kleinsmiður, rørsmiður, rør & blikksmiður og sveisara (2 1/2 ár).

Flestu útbúgvingar kunnu takast í Føroyum, men í ávísum førum er 1. og 2. skúlaskeið í Føroyum – meðan 3. skúlaskeiði og sveinastykkið verður gjørt í tekniskum skúla í Danmark.

### ✓ Maskinsmiður

Læran til maskinsmið fevnir um at viðlíkahalda, umvæla og montera høvuðspartarnar av einum motori, og at gera minni konstruktiónir av plátu- rør og stálprofilum.

Harumframt verður lært at byggja upp, forrita, finna brek og at umvæla einfaldar stýringstekniskar skipanir – at velja røtt amboð og rætt dátugrundarlag í sambandi við fram-

leiðsluuppgávur. Hartil koma viðlíkahaldsuppgávur av rørskipanum, pumpum og ventilum.

Maskinsmiðir kunnu seinni læra til maskinmeistara, framleiðslutøkning ella verkfrøðing.

## ✓ Kleinsmiður

Tað stutta ein kann siga um útbúgvingina til kleinsmið er, at talan er um at læra grundleggjandi vitan um metal og, hvussu tað kann viðgerast. Arbeitt verður við fleiri ymiskum sløgum av metalli.

Ein týðandi partur er at duga at velja rætt tilfar og rættan arbeiðshátt til tær ymisku uppgávurnar.

Lært verður at gera tilskeringar í plátur og rør, at montera lutir, maskinur og installatiónir og at viðlíkahalda framleiðslutól. Harumframt kemur læran um yvirflatu- og eftirviðgerð av metalli og øðrum tilfari.

## ✓ Rustfastur kleinsmiður

Her er talan um eina útbúgving, har dentur verður lagdur á at læra at gera samansetingar av forgreiningum og bukkingum í rørum í rustføstum stáli, og at velja egnaðar eftirviðgerðir og fremja yvirflatu- og eftirviðgerð av rustføstum stáltilfari.

## ✓ Rør- og blikksmiður

Útbúgvingin til rør- og blikksmið fevnir um nýgerð og røkt av vatn-, hita-, gass og ventilatiónsinnleggingum í sethúsum og virkjum. Somuleiðis at seta upp stýriskipanir, oljuketlar og varandi orkuinstallatiónir.





Harumframt koma tunnplátusamankomingar við sveising úr aluminium, stáli og rustføstum tilfari, at lodda, nitta og falsa. Og lærlingarnir læra at leggja til rættis og gera minni skap í plátu-, rør- og stálprofilum, og at gera inndekningar og kappabjálving, umframt at veita kundavegleiðing.

### ✓ Rørsmiður

At læra til rørsmið fevnir um at læra at arbeiða við nýgerð og røkt av installatiónsarbeiði í sethúsum, verksmiðjum og virkjum. Talan er um at seta upp hvs-stýringsskipanir, oljuketlar og varandi orkuinstallatiónir, og at veita kundavegleiðing.

Harumframt verður lært at gera samankomingar, tilskeringar og evna til skurð í plátum og rørum. Og lærlingarnir læra at leggja til rættis og gera minni skap í plátu-, rør og stálprofilum.

### ✓ Sveisari

At læra til sveisara fevnir um at gera tilskeringar og evna til rættar-, skráar- og heildarskurð í plátur, rør og tvørskurðir.

Ein sveisari skal verða førur fyri at leggja til rættis og gera einfaldar framleiðsluuppgávur, manuelt eins væl og við maskinum, at leggja til rættis og gera skap í plátu-, rør- og stáltvørskurðum.

Og útbúgvingin fevnir um, at duga at viðlíkahalda amboð, at yvirflatu- og eftirviðgera metal og annað tilfar, og at kunna leggja til rættis samansettar sveisiuppgávur.

## Styttri framhaldsútbúgvingar hjá Tekniska skúla

Skúlin bjóðar tvær styttri framhaldsútbúgvingar, sum verða nevndar framleiðslutøkningur og byggitøkningur; talan er um 2 ára útbúgvingar.

Upptøkukrøvini eru: viðkomandi handverkaraútbúgving, SIT ella 4. skúlaskeið í yrkisnámi, miðnámsútbúgving ella samsvarandi.

Felags fyri hesar útbúgvingar er, at eftir lokna útbúgving er møguligt at fara undir hægri útbúgvingar.

### ✓ Framleiðslutøkningur

Dentur verður lagdur á góð evni, tá talan er





um tøkni og praktiskar loysnir. Framleiðslutøkningurin er ein kveikjandi leiðari og samskipari, sum er førur fyri at hava dagligt samskifti við fleiri ymiskar fakbólkar. Útbúgvingin til framleiðslutøkning fevnir um arbeiði við nýhugsan, sum hevur rót í hollari vitan, ið ofta leiðir til íverksetaramentan.

### ✓ Byggitøkningur

Útbúgvingin miðar m.a. ímóti ymiskum størvum í byggivinnuni og hjá virkjum, ið framleiða byggitilfar v.m. Somuleiðis størv hjá ráðgevandi arkitektum/verkfrøðingum.

## Skapandi yrkisgreinar og atstøðiútbúgvingar

### ✓ Hárfríðkan

Útbúgvingin fevnir mest um hárviðgerð, men lærlingarnir læra eisini alt um vakurleikarøkt.

Harumframt kemur kunnleiki í sambandi við at reka egið virki, so sum búskap, kundarøkt, sálarfrøði og mangt annað. Arbeiðið er fjølbroytt, tí mótin skiftir rættiliga ofta.

Umframt arbeiði í hárfríðkanarstovum, starvast hárfríðkarar t.d. eisini í sjónleikarahúsum og sjónvarpi.

Við hesi útbúgvingini er møguligt at út-





búgva seg víðari til t.d. stylist, kosmetikara, kosmetolog, make-up artist, manicurist o.a.

### ✓ Klædnaatstøði

Klædnaatstøði er 2 ára grundútbúgving. Dentur verður lagdur á at arbeiða við teimum skapandi evnunum, sum hava stóran týdning t.d. í mótaheiminum. Arbeitt verður við sniðgeving, seyming, konstruktión og mótasøgu.

Við hesi útbúgving er møguligt at útbúgva seg víðari til t.d. sniðgeva og klædnahandverkara.

Útbúgvingin gevur førleika til at arbeiða á seymistovu ella gerast sjálvstøðugur vinnurekandi.

### ✓ Tilvirkisatstøði

Tilvirkisatstøði er 2 ára grundútbúgving, sum fevnir um øll liðini í framleiðsluni at virka ull, skinn og fiskaskræðu og samstundis leggur dent á handverkið sum listhandverk.

Endamálið er at menna eina nýggja framleiðsluvinnu, sum hevur samband við okkara tilfeingið.

Útbúgvingin er føroysk útbúgving, og tekur støði í tí veruleika, sum vit liva í. Hetta er ein útbúgving, sum kann birta upp undir skapandi hugin, og geva grundvitan um sjálvt handverkið.

Við hesi útbúgving er møguligt at fara undir framhaldandi útbúgving í Íslandi.




Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av
lágorkutermorútum,
u-virði niður í 0,4.
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Limousine
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión

Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

Vit bjóða m.a.

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo




Linde Gas

AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

*Upplatingartíðir :*
mána, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**

# SJÓNARHORNIÐ: FRÓÐI BENJAMINSEN

**Børn:**
Aron 7 ár, Sara 5 ár og Emma 1 ár

**Kona:**
Súsan

**Útbúgving byrjað:**
Byrjaði at læra til timburmann í 2000

**Lærumeistari:**
Sp/f Haldur Vang

**Útbúgvingin lokin:**
2004

**Størv:**
Eftir lokna lærutíð flutti eg til Ísland, har eg arbeiddi í eitt ár. Síðstu 10 árini havi eg starvast hjá Húsavarðartænastuni.

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Hon er góð.

**Hvat heldur tú um lívstryggingina hjá felagnum:**
Hon er góð men vónandi komi eg ikki at hava brúk fyri henni.

**Hvat er største avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**
Tað er at gera arbeiði skjótt og væl úr hondum greitt. Tí tað selur seg sjálvt.

**Hvussu gamal var tú, tá tú spældi tín fyrsta fótbóltsdyst:**
Eg var 6 ár og spældi við smápiltum hjá B68.

**Hvør heldur tú er heimsins besti fótbóltsspælari:**
Ronaldo

**Hvat gleðir teg í gerandisdegnum:**
Tá fólk rundan um meg hava tað gott.

**Hvat kann øsa teg:**
Tá tað ikki gongst eftir ætlan.

**Frítíðarítriv:**
Fótbóltur fer við so nógvari tíð, at tað er ikki pláss fyri øðrum ítrivum.

**Besta bók:**
Barnabíblian

**Besti sangari:**
Sorin Anghel, ein, góðan arbeiðsdag.

**Besti filmur:**
Gladiator

**Besti handverkari tú veit um:**
Jóanis Poulsen

**Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:**
Fleiri, men konan og børnini hava nokk havt stórst ávirkan tey síðstu árini

**Søguligur persónur, sum hugtekur teg:**
Jesus

**Telefon:**
Sony

**Telda:**
Compaq

**Bilur:**
Ford s max




*Fróði Benjaminsen*
*Mynd: Heinesen myndir*

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV













**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkara-arbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo






2x3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

AMBOÐ ARBEIÐSKLÆÐIR
TILFAR BESLØG MASKINUR

Júst tá tú stendur
og manglar tað

2x3 & Timburhandilin Tórshavn: 31 12 50 Kambsdalur: 44 44 41

*Bjørn Kalsø:*

# Ungdómurin er okkara týdningarmesta tilfeingi

Røða hildin í sambandi við 80 ára hátíðarhaldið í Tekniska Skúla 10. november 2014:

Góða leiðsla, góðu starvsfólk, næmingar og góða samkoma – hjartaliga til lukku við 80-ára degnum.

Líta vit aftur í tíðina, so kunnu vit í Dimmu tann 3. november 1934 lesa, at „Tórshavnar tekniski skúli byrjar um miðjan november."

Næmingar, sum ætlaðu at ganga á skúlanum, vóru bidnir um at venda sær til formannin í Havnar Handverksmeistarafelag, Johannes Simonsen.

Lýsingin í Dimmu bar loksins boð um broyting, tí eftir fleiri royndum at seta tekniska skúla á stovn, var skúlanum nú lív lagað.

Løgting og býráð høvdu játtað skúlanum stuðul umframt innivist, fyrst í húsunum hjá Jens Paula í Dali undir Pisuvarða, og síðani í gamla sjómansskúlanum við J.C. Svabosgøtu.

Soleiðis byrjar søga skúlans, árið er 1934, Italia vinnur heimsmeistaraheitið í fótbólti, fyrsta útgávan av kenda blaðnum Informatión verður prentað, og fyri fyrstu ferð í filmssøguni trínur Dunnaldur Dunna fram á løriftið.

Men vit minnast eisini aftur á syrgiligu vanlukkuna, tá sluppirnar Neptun úr Vestmanna og Nólsoy úr Havn gingu burtur í stormi undir Íslandi og 43 mans sjólótust.

Í 1934 eitur tann nýggi týski ríkiskanslarin Adolf Hitler, sum tíverri fekk alt ov stórt ræði á fólki og landi.



Men sama ár verður køliskápið uppfunnið, men vóru tað nokk ikki vanligar matvørur, ið lógu fremst í huganum hjá týskarum. Tí fyrstu royndirnar við køliskápinum vóru gjørdar við øli.

Ja, soleiðis vóru tíðirnar fyri 80 árum síðani, tá ið Havnar Handverksmeistarafelag tók stig til at seta Tekniska skúla á stovn. Søga Tekniska skúla er tí eisini søga Havnar Handverksmeistarafelag, sum átti og rak skúlan øll tey fyrstu árini. Men tíðirnar broytast, og Tekniski skúli gjørdist ein almennur sjálvsognarstovnur. Árið er 1956, og eins og áður var galdandi fyri handverksmeistararnar, so skuldi eingin løta fara til spillis. Longu í hesum sama ári, sum nevndin var sett, keypti skúlin húsini hjá Føroya Banka við Tórsgøtu. Skúlin átti nú fyri fyrstu ferð tak yvir høvdið.

## Býráði letur lendi í 1969

Árini ganga, og næmingatalið veksur støðugt. Tá eingin bygging kundi fáast í lag, mátti takast til onnur ráð. Skúlin finnur sær innivist ymsastaðni í býnum, men so upprennur tann dagur, tá býráðið letur skúlanum lendið við Marknagilsvegin. Árið er 1969, og í 1975 stendur hesin bygningurin, vit eru í, liðugur. Stutt eftir letur býráðið eisini skúlanum hallirnar við Smiðjugerði, og har húsast skúlin enn.

Ja, hølisviðurskiftini hava verið størsta avbjóðing skúlans øll árini.

Mangur leikur er í longum talvi, soleiðis verður tikið til, og soleiðis er eisini við hesum. Nógvar rembingar hava verið, men nú røkist fyri, at Tekniski skúli fær eitt av sínum hjartamálum framt.

Í 2008 samtykkir Løgtingið at fara undir at byggja skúladepil við Marknagil, og ímeðan vit hátíðarhalda henda dagin, síggja vit eisini, hvussu skúladepilin reisir seg úr lendinum uttanfyri.

Sum landsstýrismaður eri eg ógvuliga fegin um, at Tekniski skúli saman við Føroya Handilsskúla og Føroya Studentaskúla nú fáa góðar karmar at virka í. Eg hugsi ofta, at hesin stórfingni varði fer ongantíð at lata okkum gloyma, at ungdómurin er okkara týdningarmesta tilfeingi. Og eg eri sannførdur um, at henda íløga fer at løna okkum fleirfalt aftur. Vit vita øll, at útbúgving hevur sera stóran týdning í einum nýtímans og framkomnum samfelag. Leiðsla og starvsfólk í Tekniska skúla hava ongantíð fírt fyri at vísa á tørv og neyðturviligar broytingar og tey hava soleiðis mangan ruddað slóð fyri nýggjum útbúgvingum, sum komnar eru. Gjøgnum tíðirnar hevur Tekniski skúli á henda hátt og mangan annan hátt givið yrkisútbúgvingum og harvið eisini handverkinum í Føroyum eitt trygt støðufesti og ein dyggan samleika.

## Nýggi skúlin liðugur um 1½ ár

80 ár eru liðin síðan Tekniski skúli var settur á stovn, og um alt gongst eftir ætlan verður nýggi skúladepilin tikin í nýtslu um hálvt annað ár. Eg dugi illa at ímynda mær, hvar vit vóru í dag, um tað ikki valdaði áræði, hugsjón og tollyndi millum tykkum og tykkara undangongufólk. – Takk fyri tað!

Sum landsstýrismaður líti eg aftur á søguna hjá Tekniska skúla við takksemi og virðing. Tað rennur mær í huga orðatakið: Á holla grund skuldi tað nýggja verða bygt.

Eg ivist onga løtu í, at leiðsla, lærarar og starvsfólk á Tekniska skúla fara at tryggja yrkisútbúgvingunum mennandi virkiskor, eisini tey næstu 80 árini.

Við hesum í huga fari eg at enda við at bera tykkum heilsu frá Føroya Landsstýri og okkum øllum í Mentamálaráðnum – og ynskja tykkum øllum alt tað besta frameftir.

*Enn einaferð – hjartaliga til lukku*
*við degnum.*

*Heðin Mortensen:*

# Eitt fantastiskt umhvørvi

## Í sambandi við 80 ára hátíðarhaldið, sum var í Tekniska Skúla, segði Heðin Mortensen í røðu síni:



Nú veksur ein nýggjur og stórur skúli upp úti í Marknagili, har fleiri skúlar og nógvar ymsar útbúgvingar koma at verða undir sama taki. Hetta verður eitt fantastiskt lestrarumhvørvi, sum vónandi verður mennandi fyri allar partar. Vit í kommununi fylgja spent við menningini. Kommunan er í holt við at prosjektera nýggjan Vesturskúla í sama øki, avgjørt er at byggja Musikkskúlan við Landavegin og vit hava eisini sett pláss av til eina stóra ítróttarhøll, umframt, at vit arbeiða við vegaføring og parkeringsøkjum.

Har hugskot gerast veruleiki, er einki minni enn søtur tónleikur í oyrunum á politikkarum, sum hvønn dag arbeiða við at skapa skúla og vinnulívi betri karmar at virka undir, at menna verandi útbúgving og vinnu og geva rúmd fyri tí nýggja.

Og í okkara føri hevur tað eisini verið eitt endamál at halda fast um verandi útbúgvingarmøguleikar, so teir ikki verða fluttir úr høvuðsstaðnum.

Skúlin varð stovnaður í 1934 og hevur síðan verið ein føst býarmynd við ómetaligum týdningi fyri útbúgving og menning. Tað var Havnar Handverksmeistarafelag, sum stovnsetti skúlan, og í 1956 gjørdist skúlin sjálvsognarstovnur.

Vit plaga at siga, at tá tað gongur væl í Havnini, so gongur væl í øllum landinum. Á sama hátt ber til at avlesa støðuna í samfelagnum á næmingatalinum á Tekniska Skúla. Gongur væl eru nógvir næmingar – støðan í vinnuni beinleiðis sæst aftur á næmingatalinum á Tekniska Skúla.

## Tekniski skúli: Skúlastjórar



### Johan Ziska

Johan Ziska var skúlastjóri árini 1948 – 1973. Johan var timburmeistari og gjørdist lærari á Tekniska Skúla í 1938.



### Poul Kjartan Bærentsen

Poul Kjartan Bærentsen var skúlastjóri árini 1973 – 1992. Poul Kjartan var útbúgvin verkfrøðingur.



### Svenning Nielsen

Svenning Nielsen var skúlastjóri árini 1992 – 1997. Svenning er útbúgvin verkfrøðingur.

Og tað eru ikki smávegis tøl, vit arbeiða við. Her eru eini 80 arbeiðspláss og um 500 næmingar eru knýttir at skúlanum. Tað er eisini hugaligt at síggja, hvussu næmingatalið eitt nú fylgir støðuni í byggivinnuni.

Nú veksur ein nýggjur og stórur skúli upp úti í Marknagili, har fleiri skúlar og nógvar ymsar útbúgvingar koma at verða undir sama taki. Hetta verður eitt fantastiskt lestrarumhvørvi, sum vónandi verður mennandi fyri allar partar.

Vit í kommununi fylgja spent við menninginni. Kommunan er í holt við at prosjektera nýggjan Vesturskúla í sama øki, avgjørt er at byggja Musikkskúlan við Landavegin og vit hava eisini sett pláss av til eina stóra ítróttarhøll, umframt at vit arbeiða við vegaføring og parkeringsøkjum.

So talan verður um eitt ótrúliga spennandi, fjølbroytt og mennandi útbúgvingarøki, har vónandi allar eindirnar fara at fáa nyttu av hvørjum øðrum. Eg síggi, at tað longu alment er nevnt, at bæði tónleikur og ítróttur kunnu blíva ein partur av undirvísingartilboðunum.

Eg ivist ikki í, at Marknagilsdepilin – saman við øllum hinum tilboðunum í hesum

framkomna lestrarumhvørvinum – fer at lyfta okkum uppá eitt munandi hægri útbúgvingarstøði, sum eisini fer at verða fyrimyndarligt fyri okkara útlendsku grannar.

Men tað er sera týdningarmikið, at Tekniski Skúlin ikki druknar í samanleggingini og spakuliga hvørvur úr myndini. Tað hevur stóran týdning, at Tekniski Skúlin sum stovnur varðveitir sítt image og sín samleika.

Eg havi sjálvur handliga útbúgving og havi gingið á Tekniska Skúla, og tað er ongin ivi fyri mær, at henda útbúgving hevur hjálpt mær og hjálpir mær hvønn einasta dag at taka góðar og rættar avgerðir.

Tað er stórur eftirspurningur eftir føroyskum handverkarum í dag, bæði her heima hjá okkum og uttanlands. Og tað kemur ikki av sær sjálvum, tí sum Benjamin Franklin tekur til, „varða teg fyri smáum lekum. Teir søkkja eisini stór skip“, ja, so liggur tað í tí, at ein handverkari skal vera sera nærlagdur, hava gott yvirblikk og duga sítt handverk til lítar, annars kann tað fáa ringar fylgjur við sær.

Okkara lærlingaskipan hevur ómetaliga stóran týdning, tí hon er grundarlagið undir, at vit megna at útbúgva fólk til alt frá byggivinnu til frálandavinnu.

Haldi tó ikki, tað er við sorgblídni, vit halda henda seinasta runda føðingardagin. Tí vit hava so nógv gott í væntu.

Eg fari býráðsins vegna at ynskja okkum øllum hjartaliga tillukku við áttati ára degnum, og eg vóni, at vit næsta runda føðingardagin kunnu bjóða tykkum, sum tá verða partur av Marknagilsdeplinum, eitt mennandi umhvørvi, sum næstan ikki hevur sæð sín líka.

## *Tekniski skúli: Skúlastjórar*



### Egon Øregaard

Egon Øregaard hevur verið skúlastjóri í Tekniska Skúla í Tórshavn síðani 1997. Egon fór í elektrikaralæru hjá Poul Jákup Hansen í Fuglafirði, og var útbúgvin elektrikari í 1971. Hann tók maskinmeistaraprógv í Føroyum í 1978; og víðka maskinmeistaraprógv í Danmark í 1979.

# LØNARTALVA – 1. OKTOBER 2014 NR. 66

| | | |
|---|---|---|
| **Tímaløn handverkarar:** | | |
| Longri útbúgving | | kr 131,48 |
| Styttri útbúgving | | kr 126,18 |
| | | |
| **Fastløntur handverkari:** | | kr 22.789,43 |
| Við 3 ára starvstíð | | kr 23.154,06 |
| | | |
| **Yvirtíðarlønir:** | | |
| Fyrstu 4 tímarnar | + 35% | kr 177,50 |
| Næstu 3 tímarnar | + 60% | kr 210,37 |
| Fylgjandi tímar | + 100% | kr 262,96 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | + 100% | kr 262,96 |
| | | |
| 1. mai og nýggjársaftan eru heilir frídagar.<br>Flaggdagur, grundlógardagur,<br>1. nov., jólaaftan eru frídagar aftaná kl. 12.00<br>og arbeiði í mattíð | + 100% | kr 262,96 |
| | | |
| **Viðbøtur: + hesi % av handverkaralønini** | | |
| Amboðspeningur | 1,00% | kr 1,31 |
| Skitiarbeiðspeningur | 0,41% | kr 0,54 |
| Bergholsarbeiði | 8,28% | kr 10,89 |
| Dampketilsarbeiði | 8,28% | kr 10,89 |
| Olju-og lýsitangaarbeiði og arbeiði í smáum tangum | 8,28% | kr 10,89 |
| Skittfiska- og sildalastarbeiði | 8,28% | kr 10,89 |
| | | |
| Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar | | |
| | | |
| **Bakarar:** | | |
| Kl. 04-07 | + kr 65 | kr 196,48 |
| Kl. 04-07 vikuskifti | + kr 100 | kr 231,48 |
| | | |
| **Servisufak:** | | |
| Leygardag kl. 08 – 14 | + 35% | kr 177,50 |
| aftaná kl. 14 | + 100% | kr 231,48 |

**Skiftisarbeiði:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. bólkur | | kr 131,48 |
| 2. bólkur | 6,63% | kr 140,20 |
| 3. bólkur | 9,11% | kr 143,46 |

**Serarbeiðarar: (við útbúgving)** kr 122,86

**Serarbeiðarar: (uttan útbúgving)**

| | | |
|---|---|---|
| 1. árið | | kr 117,67 |
| 2. árið | 1,45% | kr 119,38 |
| 3. árið | 2,92% | kr 121,11 |
| 4. árið | 4,41% | kr 122,86 |

**Starvstíðarviðbót**

Fyri 3 ára starvstíð 1,60%

**LÆRLINGALØNIR**

| | | Um tíman | Um vikuna |
|---|---|---|---|
| 1. árið | 32% | kr 42,07 | kr 1.682,80 |
| 2. árið | 40% | kr 52,59 | kr 2.103,60 |
| 3. árið | 45% | kr 59,17 | kr 2.366,80 |
| 4. árið | 55% | kr 72,31 | kr 2.892,40 |
| 5. árið | 70% | kr 92,04 | kr 3.681,60 |

**Pensiónsgrunnur (lærlingar):** 7,50%

Fyri yvirarbeiði verður øll læruárini goldið

| | | | |
|---|---|---|---|
| serarbeið.løn á 1. ári | kr. 117,67 | + hesi % | |
| Fyrstu 4 tímarnar | | + 35% | kr. 158,85 |
| Næstu 3 tímarnar | | + 60% | kr. 188,27 |
| Fylgjandi tímar | | +100% | kr. 235,34 |

*Leygardag:*

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 5 tímarnar | + 35% | kr. 158,85 |
| Fylgjandi tímar | + 60% | kr. 188,27 |
| *Sunnu- og halgidagar:* | +100% | kr. 235,34 |

**Lærlingaviðbøtur fyri forskotna tíð**

| | |
|---|---|
| *Bakaralærlingar* | |
| Allar dagar kl. 18.00 – 04.00 | kr 35,00 |
| Sunnu- og halgidagar kl. 00.00 – 24.00 og frídagar | kr 25,00 |
| *Kokka- og tænaralærlingar* | |
| Gerandisdagar kl. 18.00 – 06.00 | kr 4,00 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | kr 5,50 |
| *Frisørlærlingar* | |
| Sunnudagar verða goldnir eins og yvirtíð hjá lærlingum | |

**ANNAÐ**

| | |
|---|---|
| *Gjøld sbrt. sáttmála:* | |
| VITAN (Eftirútbúgvingargr.) 2X10oyru/tím. | |
| Pensiónsgrunnur | 13,00% |

| | |
|---|---|
| *Lógarásett gjøld* | |
| Samhaldsfasti | 1,75% |
| ALS gjald frá 01.01.2012 | 1,25% |
| Barsilsskipan | 0,62% |
| Frítíðarløn | 12,00% |

Føroya Arbeiðsgevarafelag
tlf. 309900 · fax.309901

Føroya Handverksmeistarafelag
tlf. 309900 · fax.309901

/ Landsfelag Handverkaranna
tlf. 354800 · fax.354801




Vinnukundadeildin í Eik

# Tryggja tær arbeiðsfrið

Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.

Sverri er vinnukundaráðgevi í Eik.
Sum partur av byggivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum.
Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.

www.eik.fo tel. 348000



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

aquatherm BAXI ROYAL SCANDINAVIAN VØLUND VARMETEKNIK

**DEMICH P/F**
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn
Tel 200 300
Fax 200 301
demich@demich.fo

# HVS-VEITARIN
# TIL VINNUNA

**HITAPUMPUR**
**KETLAR**
**VENTILATIÓN**
**RØR OG FITTINGS**
**BAÐIRÚMSMØBLAR**
**GOSBAÐ**




**Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345**

## Tí velja handverkarar Demich

- Vit veita bestu ráðgevingina
- Vit umboða dygdarvørur
- Vit hava kappingarførar prísir
- Vit hava góða kundatænastu
- Vit hava døgntænastu
- Vit hava framkomnar blikksmiðju
  *(Har vit kunnu tilevna inndekningar upp til 3 m)*

**demich**
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet

Okkara dygd – tín trygd!

www.demich.fo

www.grafikmaster.fo

# MARKNAGILSDEPILIN, TANN GÓÐA ÆTL



**Eftir at løgtingið á vári 2008 samtykti at fara undir at byggja ein skúladepil í Marknagili gjørdi Landsverk skjótt av og fór undir fyrireikingararbeiði.**

Ein bygginevnd, sum m.a. varð mannað við umboðum fyri skúlarnar, Mentamálaráðið og Landsverk, varð sett at gera eina byggiskrá.

Úrslitið av hesum arbeiði gjørdist, at 5 arkitektafyritøkur vórðu bjóðaðar at koma við uppskotum til byggingina. Av hesum vórðu tvær valdar út til at gera endaligt uppskot.

### Dómsnevnd

Ein dómsnevnd varð sett at velja tað endaliga arkitektauppskotið, og valið fall á uppskotið hjá kendu donsku arkitektafyritøkuna, Bjarke Ingels Group (BIG). Uppskotið varð gjørt í samstarvið føroysku arkitektarnar, Fuglark.

Talan er um spennandi arkitektur við rundum høvuðsbygningi og 5 fýrkantaðum ørmum, ið stinga út í hvør sína ætt.

Eftir at BIG hevur detailprojekterað alla verkætlanina, bjóðaði Landsverk sum byggiharri til undangóðkenning av fyritøkum, ið

# ANIN VIÐ NÓGVUM TRUPULLEIKUM



ynsktu at bjóða upp á eina ella fleiri av teimum 8 stórarbeiðstøkunum.

## Skúladepilin í tølum

- **Fermetrar:** 19.400 fermetrar til støddar.
- **Mettur kostnaður:** 391 mió. kr. umframt innbúgv o.a. umleið 60 mió. kr.
- Pláss fyri umleið 1.300 næmingum.
- **Fer at hýsa teimum trimum miðnámsskúlunum í Havn:** Handilsskúlanum, Tekniska skúla og Studentaskúlanum, sum koma at hava felags leiðslu.
- Arbeiði bygdi nú á, at skúladepilin skuldi takast í nýtslu í 2016.

## Leisturin hjá Landsverki

Leisturin, sum Landsverk nú legði var, at verkætlanin skuldi býtast upp í stórarbeiðstøkur, tí tað bæði frá politiskari og vinnuligari síðu var eitt sterkt ynski um, at føroyskar fyritøkur skuldu hava javnbjóðis møguleika við útlendskar, ið sum heild eru munandi størri enn tær føroysku. Slíkt gerst best við einum tílíkum leisti, tí tá hava eisini minni fyritøkur møguleika at bjóða seg fram.

## Landsverk setur fleiri fólk at umsita

Verkætlanin gjørdist spennandi og stór – ja kanska ov stór – hjá Landsverki.

Fleiri starvsfólk á stovninum vóru sett at taka sær av verkætlanini. Eitt nú arkitektar, verkfrøðingar, byggifrøðingar, roknskaparfólk, kontrollari og kunningarfólk.

Sum leiðara fyri starvsfólkatoyminum var 53 ára gamli Heini Trónd Hansen settur í starv. Hann hevði drúgvar royndir við stórum verkætlanum í Danmark.

Nú varð avgjørt, at seinasta freist at lata inn tilboð var 28. august 2012



## Høvuðsarbeiðini

Tá farið var undir at fyrireika tilboð v.m. vóru 21 fyritøkur undangóðkendar og tær 8 stórarbeiðstøkurnar vóru hesar:

1. *Jørð, kloakk, betong og stálarbeiði.*
2. *Innilokan.*
3. *Innrætting o.a.*
4. *El-arbeiði o.a.*
5. *HVS, luftskiftisskipanir o.a.*
6. *Múraraarbeiði o.a.*
7. *Málaraarbeiði o.a.*
8. *Lendisarbeiði o.a.*

## Tá freistin var úti høvdu hesi latið inn tilboð:

**1. TG Verk**
*Jørð, kloakk, beton og stál: 138,8 mió. kr.*

**2. TG Verk**
*Innilokan: 108,5 mió. kr.*

**3. TG Verk**
*Innrætting: 99,0 mió. kr.*

**4. El Team Vest**
*El arbeiði: 35,0 mió. kr.*

**5. Demich**
*HVS, luftskipanir: 62,6 mió. kr.*

**6. TG Verk**
*Múraraarbeiði: 22,7 mió. kr.*

**7. Anskar Hansen**
*Málaraarbeiði: 0,9 mió. kr.*

**8. Articon**
*Lendisarbeiði: 8,0 mió. kr.*

## Tilboðini ov stór í mun til løgtingslóg

Samlaðu byggiútreiðslurnar fyri Marknagilsdeplin vóru í verklagslógini ásettar til at vera í mesta lagi 391 miljónir krónur.

Tá var innbúgv og onnur útgerð, sum væntandi fór at liggja um 60 miljónir krónur, ikki íroknað.

Landsverk stóð nú við tilboðum, sum samanlagt ljóðaðu uppá 475 mió. kr. Tað vil siga, at nú hevði verkætlanin aftur rent seg fastan, tí innkomnu tilboðini vóru ov stór í mun til verklagslógina.



## Depilin, ið kortini gjørdist veruleiki

Sum nevnt gjørdust tilboðini, sum komu inn til bygging av Marknagilsdepilin alt ov stór í mun til táverandi løgtingsjáttan.

Støðan gjørdist nú so mikið álvarsom, at tað vóru tey sum mettu, at Marknagilsdepilin ikki fór at vera bygdur.

Av tí at byggiætlanini kom í hesa støðu valdi verkætlanarleiðarin, Heini Trónd Hansen, at siga seg úr starvi.

## Verkætlanin verður skorin

Men Landsverk hevði ikki mist mótið. Farið varð undir at kanna um tað ikki var møguligt at broyta ella skera av ætlanini soleiðis, at prísurin kundi fáast niður.

Tá hesar royndir vóru av vísti tað seg, at tað hevði eydnast Landsverki at skarva 92 milliónir kr. av kostnaðinum. Men hetta var kortini ikki nó mikið til at fáa samlaða kostnaðin av Marknagilsdeplinum niður á eitt støði, sum var í samsvar við verkfalslógina, sum løgtingi hevði samtykt.

Tað sum so hendi var, at Bjørn Kalsøe legði uppskot fyri tingið um at hækka játtanina úr 391 til 515 mió. kr. við innbúgvi.

Men sjálvandi bar ikki til at spara 92 mió. uttan at gera broytingar av byggiætlanini. Eftir uppskoti, sum Landsverk hevði gjørt, var samlaða víddin skorin við 2.000 fermetrum.

Ein partur av hesi minking var at skúlastovurnar, sum upprunaliga vóru 69,4 fermetrar, vóru skornar niður í 65,4. fermetrar. Men hetta var kortini ikki nó mikið.

Ein bygningur, sum skuldi standa leysur av deplinum til tað, sum nevnt var ”instalatiónir” var strikaður og hesar funktiónir vóru í staðin fluttar inn í høvuðsbygningin.

Samlaða hæddin av deplinum var minkað við u.l. 4 metrum.

Harumframt var ein partur av glasfasaduni skorin; uppleggið hjá Landsverki var, at 20% av galsfasaduni skuldi gerast úr øðrum bíligari tilfari. Í hesum sambandi kunnu vit nevna, at atfinningarsamar røddir høvdu verið frammi um júst hendan partin av byggiætlanini.

Ein partur av spariætlanini er at strika partar av el-tilfarinum so sum t.d. vanligar



avbrótarar og stikkontaktir. Her kunna vit eisini nevna, at upprunaliga ventilatións-skipanin er slept.

Og so er eftir at nevna, at sum heild skal bíligari tilfar brúkast í mun til upprunaligu ætlanina; hetta snýr seg serliga um veggir, loft og gólv.

## Løgting, fíggjarnevnd og fíggjarmálaráðið

22. mars 2013 samtykti løgtingið endaligu verklagslógina, sum Marknagilsdepilin skal byggjast eftir.

Samtyktin heimilar landsstýrismanninum í mentamálum at brúka upp til 515 milliónir krónur til skúladepilin í Marknagili.

Tá málið var í Fíggjarnevndini hjá løgtinginum segði nevndin millum annað soleiðis: Fíggjarnevndin hevur av royndum staðfest, at kostnaðarætlan ikki heldur í almennum byggiverkætlanum. Tí hevur Fíggjarnevndin í samráð við landsstýrismannin í fíggjarmálum arbeitt fyri, at verklagslógir skulu umfata allar útreiðslur.

Í sambandi við viðgerð av hesum málinum hevur Fíggjarnevndin sett landsstýrismanninum spurning viðvíkjandi kostnaðar- og tíðarætlanini.

Í sínum svari til Fíggjarnevndina vísir landsstýrismaðurin til svar frá ráðgevarunum. Fíggjarnevndin leggur áherðslu á, at landsstýrismaðurin skal fylgja neyvt við verkætlanini og staðiliga gera sínum ráðgevum greitt, at kostnaðarmetingin og tíðarætlanin skulu halda. Fíggjarnevndin vísir á, at málið hevur fingið eina drúgva og langa viðgerð, og heldur, at um tíðar- og kostnaðarætlanin skulu halda, er neyðugt, at arbeiðið verður sett í gongd beinanvegin.

29 tingfólk vóru í tingsalinum til 3. viðgerð, og øll atkvøddu tey fyri lógaruppskotinum hjá Bjørn Kalsø, landsstýrismanni í mentamálum.

Harvið er tað eitt samt løgting, ið nú stendur aftanfyri Føroya størstu byggiverkætlan, ið gerst góðar 60 milliónir krónur dýrari enn upprunaliga ætlað.

## Nýggjru verkætlanarleiðari

Nú boðaði Landsverk frá, at 3. apríl 2013 var Hans Pauli K. Henriksen – vanliga nevndur Palli Henriksen – settur í starv sum verkætlanarleiðara í staðin fyri Heina Tónd Hansen, sum hevði sakt seg úr hesum starvi.

Palli er ein royndur maður innan verkætlanarleiðslu, sum Landsverk hevur sett at

standa á odda fyri byggingini av skúladeplinum.

Palli Henriksen, sum er 52 ára gamal og útbúgvin bygningsverkfrøðingur, hevur havt ábyrgd av fleiri stórum verkætlanum. Hann kemur úr einum starvi sum verkætlanarleiðari hjá Tórshavnar Kommunu, har hann millum annað hevur staðið á odda fyri nýggja Boðanesheiminum og Skúlanum við Løgmannabreyt.

Áðrenn Palli Henriksen kom í starv hjá kommununi, var hann verkætlanarleiðari fyri Samtakið Hoyvíkshagin Suður – millum J&K Petersen og Byggitek – ið er størsta einstaka útstykkking í Føroyum higartil.

Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki, fegnast um, at tað hevur eydnast at fingið ein væl skikkaðan avloysara fyri Heina Trónd Hansen, sum frammanundan stóð á odda fyri verkætlanini, men nú er farin í annað starv í Danmark.

Talan er um eina sera stóra uppgávu, og tí var tað týdningarmikið, at vit fingu rætta persónin at standa á odda fyri verkætlanini við Marknagil. Tað ivist eg ikki í, er eydnast okkum við hesi setanini, sigur Ewald Kjølbro stjóri hjá Landsverki.

Palli Henriksen, sum eisini hevur havt egna tekni- og ráðgevingarfyritøku innan byggivinnu.

Ongin ivi er um, at talan er um eitt ódnartak, men samstundis er hetta ein ómetaliga spennandi avbjóðing, sum eg ikki kundi siga nei til, sigur nýggi verkætlanarleiðarin Palli Henriksen.

## Prutlar tað aftur undir lokinum?

Tað seinasta, sum frættist um Marknagilsdepilin er, at hann møguliga skal hitast við jarðhita, sum upprunaliga var ætlanin. Hetta sigur okkum at endaliga projektið ikki enn er komið í ein rimmarfasta legu.

Vónandi verður hetta kortini ikki ein snávingarsteinur.

gimmix.fo
– alskyns reklamulutir
Tel. 224692 & 211083

**Húsavarðartænastan**

**Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@hvt.fo | Tel. 29 00 29**



# OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.











## Reinsa við turr-ísi

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.



## Betong-saging

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.





*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...*

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika



Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo




**Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.**

**Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.**

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

**Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.**





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón